## Hjartað lá eftir í Køln

Lukas Podolski var fyri nøkrum árum síðani roknaður sum størsta álopstalentið í Týsklandi. Tað fekk Bayern at keypa Podolski úr Køln, men Podolski sló ongantíð til í Bayern. Nú er hann farin aftur til Køln at spæla. - Hann hevði ov lætt við at geva upp, og hann var ikki líka treiskur, sum aðrir spælarar eru. Trupulleikin var, at hjartað hjá honum lá eftir í Køln, sigur Uli Hoeness, ítróttarstjóri í Bayern.



## Hoffenheim á toppinum

Í fyrsta umfari av týsku landskappingini legði lítla felagið Hoffenheim seg aftur á odda. Hoffenheim spældi ímóti Cottbus og vann 2-0. Samstundis tapti Bayern fyri Hamburg, og so kundi Hoffenheim klatra upp á ovast rók í Bundesliguni aftur. Við ósigrinum datt Bayern niður á fjórða pláss, tí bæði Herta Berlin og Hamburger SV fóru fram um.

Neistin-H71 27-26 (14-11):

# Neistin misti – menn vann



*Ingi Olsen hevur fyri tað nógva sitið á beinkinum, men sunnudagin spældi Neista-venjarin største partin av dystinum*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

**Fleiri av heimaáskoðarunum vóru á veg til hús við gron, tá Neistin onkursvegna koppaði uppgerðini móti H71 til egnan fyrimun**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

23 minuttir eftir á talvuni: Jugoslav Djumic hevur júst sent enn ein bólt í H71-málið. Støðan er nú 18-11, og alt bendir á, at ætlaða brakið millum Neistan og H71 varð av ongum.

Fýra minuttir eftir: Regin Joensen leypur inn frá vinstra veingi og høggur bóltin inn við nærmasta trí-kant til 25-22 til H71. Rómurin á gestunum er øgiligur, og heimaáskoðararnir eru longu í ferð við at fara úr høllini.

Ein minuttur eftir: Áki Mørk skorar eitt fantastiskt mál, har hann av baklinjuni og fullkomuliga úti av javnvág skrúvar bóltin út um Jóhan Hofgaard og inn í málið. Neistin er á odda 26-25. Og tá Ingi Olsen løtu seinni høggur undirhondsskot niður við stólparótina, eru tað hoyvíkingarnir, sum reisast úr sessunum og fara heim.

### Fult tamarhald

Jú, kontrastirnir vóru nógvir og ymiskir í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, tá nummar tvey og trý á stigatalvuni brustu saman sunnudagin.

Við einum VÍF-liði, sum ikki tykist hava hug at slaka, tykist tað vera upp til Neistan og H71 at gera av, hvør skal hava seinna finaluplássið, og kanska avgerandi tvídysturin í hesum stóð á skránni sunnudagin.

Leingi líktist hetta tó ikki nøkrum braki. Neistin er spakuliga í ferð við at finna aftur á formin, sum lyfti teir upp á oddasessin beint undan ársskiftinum, og hesa gongdina hildu teir fast um sunnudagin. Við sterkum verjuspæli hildu teir hoyvíkingunum frá teimum heilt stóru skreytunum, og í álopsspælinum riggaði væl at spæla skjótt og tunt. Bæði so skjúttarnir sluppu framat á bakkunum, og soleiðis at ein stórspælandi Jugoslav Djumic fekk framúr arbeiðsreytir á strikuni.

### Kannaðu sær bitan

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki sópaði Neistin eisini allan iva til viks. H71 royndi seg við øllum sínum trimum málverjum, men einki tóktist muna móti streyminum av Neista-málum, og dysturin líktist alt meira einum veruligum stórsigri.

Men brádliga kom stígur í. Ivaleyst kannaði Neistin sær bitan ov tíðliga, tí teir mistu ferðina í spælinum. Jóhan Hofgaard tók í einum trimum støðum upplagdar møguleikar, og so kom av álvara lív í gestirnar.

Teir høvdu annars fyri tað mesta verið steindeyðir, men við einum langum trekki togaðu teir seg aftur í dystin. Eftir at hava skotið 11 mál fyrstu 39 minuttirnar, skut hoyvíkignarnir nú eins nógv mál teir næstu 13.

Og so var alt á gosið. Heimaliðið tók sær timeout, tá talvan vísti 22-23, men tað munaði lítið, og tá tað løtu seinni stóð 22-25, tóktist eingin vegur aftur.

Hvaðani vertirnir fingu trúna aftur, er ilt at vita. Men væl hjálptir av fjáltursstungnum hoyvíkingum, sum tvær ferðir á rað avsluttaðu álop óneyðuga skjótt, kom aftur glið á hjá vertunum.

### Betri innanhýsis

Sigurin ber við sær, at Neistin nú situr við góðum fyrimuni í stríðnum um pláss í FM-finaluni. Ikki bara, tí teir nú aftur eru tvey stig framman fyri H71. Men eisini tí teir við triðja sigrinum á hoyvíkingum hava tryggjað sær, at teir eru betri í innanhýsis uppgerðunum, og tað í sjálvum sær gevur í veruleikanum hálvt stig eyka.

Og eftir at hava halta nakað síðani ársskiftið, tykjast meistararnir eisini vera í ferð við at finna aftur á røttu slóðina.

Enn kunnu forðingar tó vera á vegnum, og lítil ivi er um, at H71 stendur til reiðar at lofta, um møguleikin er har. Hóast seinasti neyvleikin enn restar, so hava hoyvíkingarnir enn góðan møguleika at koma allan vegin, og tí ræður nú um hjá teimum at gera sítt arbeiði í seinastu seks dystunum.

### FAKTA um dystin

**Neistin-H71 27-26 (14-11)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 9-6
**40 min:** 18-12
**50 min:** 22-20
**Málskjúttar**
**Neistin:** Jugoslav Djumic 11, Nogi Berg 3, Ingi Olsen 3(1), David Edvardsen 3, Áki Mørk 3(1), Tróndur Kragesteen 3, Finnur Hansson 1
**H71:** Esbern Patursson 7(1), Regin Joensen 6, Bárður Brimvík 4, Janus Sørensen 4, Johnny Durhuus 1, Gunnar Bláberg 1, Danni Syhler 1, Halgir Dahl-Olesen 1, Poul Kjartan Dam 1
**Brotskøst:** Neistin 3, H71 2
**Útvísingar:** Neistin 3, H71 5
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason

## Ætlaði sær brotskast

Vakrasta detaljan í dystin-um á Hálsi sunnudagin var uttan iva, tá Áki Mørk skrúvaði bóltin í H71-málið, soleiðis at Neistin kom upp á 26-25.

- Vit fóru í kontra, og eg bleiv pressaður nokk so langt út. So eg mátti bara royna okkurt smart, og tað eydnaðist so. Men eg rokni nú við, at dómararnir høvdu dømt brotskast kortini, segði Áki um støðuna, tá vit eftir dystin tosaðu við hann.

Sum vera man, so fegnaðist Áki um sigurin, men hann helt tó, at dysturin ongan tíð skuldi blivið somikið spennandi, sum hann bleiv.

- Vit seta ferðina niður, og helst halda vit okkum hava vunnið. Alt gekk jú sum eftir ánni, men so loyva vit teimum aftur í dystin.

Og helt tú tykkum hava tapt, tá tað stóð 22-25 á talvuni?

- Tað ivaðist eg ikki í. Men fimm minuttir er long tíð í hondbólti, og við hvørt eydnast tað kortini at venda slíkum støðum. Og fyri okkum var hetta ein sera týðandi sigur, sigur Áki Mørk.

**-mørk**

## Halda høvdinum høgt

Janus Sørensen var eins og liðfelagarnir vónbrot-in av, at tað ikki eydnaðist H71 at halda fast, tá teir høvdu strítt seg upp á 25-22. Men hann staðfesti, at tað ikki komst av, at teir hildu seg hava vunnið.

- Vit brúka øgiligar kreftir fyri at koma aftur í dystin. Vit eru aftan fyri við sjey málum og koma so trý framum, og tað kostar. Tað ger, at vit fara eitt sindur niður í ferð seinastu løtuna, og vit klára ikki at toga okkum uppaftur.

Hetta er triðja ferðin, at tit tapa tepurt móti Neistanum. Er tað ikki dýrt?

- Jú, tað kann tað væl blíva. Men hugsa vit um seinna hálvleik, so kunnu vit fara út við høvdinum høgt. Vit stríðast framúr væl, meðan fyrri hálvleikur kanska ikki er nóg góður. Men hugsa vit um seinna hálvleik, so kunnu vit halda høvdinum høgt, segði Janus Sørensen.

**-mørk**